

MYND: JENS KRISTIAN VANG

*Jónsvein Heinesen, tøkningur, og Elin á Rógvi sita í hesum døgum og framleiða jólakalendaran hjá Útvarpinum*

# Elin skrivar jólasøgu til børnini

– TAÐ ER **STUTTLIGT** AT UPPLIVA, HVUSSU **ORÐINI** BLÍVA **LIVANDI**, SIGUR **ELIN Á RÓGVI**, SUM HEVUR **SKRIVAÐ** SØGUNA TIL **JÓLAKALENDARAN** HJÁ ÚTVARPINUM Í ÁR.



**JÓLAKALENDARI**

**Eyðun Klakstein**
eydun@sos.fo

Í ár fáa børnini eina nýggja jólakalendarasøgu í Útvarpinum hjá Kringvarpinum. Elin á Rógvi hevur skrivað søguna »Eg sá ein eingil«, sum er grundarlagið undir jólakalendaranum í ár.

– Útvarpið endursendi eina jólasøgu í fjør, men tíðliga í ár bleiv gjørt av, at ein nýggj søga skuldi gerast í ár. Eg arbeiði við barnaútvarpi, og Jonna, sum eg arbeiði saman við, kom við hugskotinum um, at eg skuldi skriva søguna hesaferð, sigur Elin á Rógvi.

Hon hevur áður skrivað søgur til børn, og hevur millum annað vunnið eina norðurlendska kapping um barnasøgur.

– Eg byrjaði at skriva søguna í mars. Tað var ikki serliga jólaligt tá, men tað var ein spennandi uppgáva at sleppa at skriva søguna, sigur hon.

Síðani er nógv hent, og 1. desember er søgan klár at senda sum hoyrispæl við barnaleikarum, tónleiki, ljóðeffektum og kendum sangarum.

– Tað er stuttligt at uppliva, hvussu orðini blíva livandi, nú børnini hava spælt leiklutirnar, yrkingar eru gjørdar til sangir, og alt verður sett saman, sigur Elin á Rógvi.

## Einki verkfall

Jólakalendarin hjá Útvarpinum byrjar mikumorgunin 1. desember og verður sendur hvønn gerandisdag kl. 7.15 og endursendur um kvøldið.

Søgan er tíðaraktuell søga, og børn eru sjálvsagt í høvuðsleiklutunum. Tey, sum spæla størstu leiklutirnar, eru, Tóralvur Tórgarð, Anna Maria Steintún og Rasmus Samuelsen.

– Søgan er um ein drong, sum hevur ein strævnan stórabeiggja, og ein grannagentu hjá teimum. Søgan gongur fyri seg í Havn nú á døgum, og hon er skrivað, sum gekk hon fyri seg í desember. Tað einasta, sum eg ikki havi skrivað inn í søguni, er eitt møguligt verkfall, sigur Elin á Rógvi.

Ein partur av jólakalendaranum eru nýggir sangir, har Elin á Rógvi hevur skrivað orðini og kendir tónleikarar gjørt løgini. Tey, sum hava skrivað løgini, og syngja eru Guðrið Hansdóttir, Finnur Jensen, Jensina Olsen og Petur Háberg. Eitt lag hevur Niclas Johannesen gjørt. Sangirnir frá jólakalendaranum koma eisini út á fløgu.

## INNIHALD

2 KLUMMA: **HØVDIÐ Á BLOKKIN**
2 ELIN **SKRIVAR JÓLASØGU TIL BØRNINI**
4 INTEVIEW: **MARTIN JOENSEN**
6 TIL ARBEIÐIS: **KRISTINA CHRISTIANSEN**
7 TIPS: **EIN HEIMUR AV LITUM**
8 BAKGRUND: **TÁ ROSKILDE BANK REYK**
10 90 SEKUND: **SELMA ELLINGSGAARD**
11 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
11 SKEMT: **MANNFÓLKAMÁL TÝTT TIL VANLIGT MÁL**
12 GREIN: **EFFO Í SØRVÁGI**
18 JÓLAHANDIL **Á NETINUM**
19 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ**
20 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**

**KLUMMAN**



*Eyðun Klakstein*

# Høvdið á blokkin

Vit hava upplivað gandaorðini áður. Orðini, sum skulu broyta grundleggjandi treytir í samfelagnum ella politiska systeminum, bara vit nevna tey. *Burðardygg menning, langtíðarætlanir, reformar, visiónir og breitt samstarv bara fyri at nevna nøkur hugtøk. Tann seinasti undurdrykkurin, nú kostárið er fyri framman, er blokkpolitikkur.*

Føroyskur politikkur sigst verða so óstruktureraður og tilvildarligur, at veljarin, sum krýpur til krossin í november, hevur ikki ánilsi av, hvat hann fær í januar. Valevni og flokkar fara til val og geva lyfti, men tá ið samgonguskjalið við tilvildarligar samstarvsflokkar er undirskrivað, kennir veljarin einki aftur.

Høvdu flokkar hinvegin funnið saman fyri valið og gjørt samstarvsavtalur áðrenn valstríðið, so visti veljarin betur, hvat hann fekk eftir valið. Tað er líkasum kjarnin í sonevnda blokkpolitikkinum.

Men heldur enn at leggja høvdið á blokkin, skuldu politisku leiðslurnar komið til kjarnuna – í trupulleikanum.

Flokspolitiska hugtakið er í kreppu, og tað broytur blokkpolitikkur ikki. Ongantíð áður hava flokkarnir staðið so veikir, sum teir gera nú. Samleikin og semjurnar eru ikki tað, tær vóru, og neyvan nakar flokkur – kanska Miðflokkurin undantikin – kann breggja sær av at verða ein homogenur flokkur við innahýsis semjum á øllum politisku aksunum.

Í løtuni tykist tað, sum einhvør politikari kann fara í borgarkríggj sum einmansherur, tá hann heldur tað verða hóskandi, og avtalurnar um vápnahvíld hava við sær, at grundleggjandi avgerðir mugu bíða. Við nógvum buldribassum og solistum í løgtinginum er neyðugt við sterkum leiðslum og organisatión í flokkunum, men har manglar nógv.

Og skúlingin av politikarunum er heldur ikki tann sama. Politisku lokalfeløgini eru ikki tað, tey einaferð vóru fyri samleikan og samanhaldi í flokkunum, og politisku bløðini eru heldur ikki longur har at uppdraga komandi politikarar og halda lív í samleikanum hjá flokkunum. Samstundis hava Føroyar sum eitt valdømi havt við sær, at politikarar eftir øllum at døma í enn størri mun enn áður verða noyddir at spæla solo, um teir skulu verða valdir aftur.

Blokkpolitikkur kann ikki førast uttan sterkar flokkar, og tað er líkamikið, um politiskar avtalur verða gjørdar fyri ella eftir valið, tá ið disiplinin í flestu flokkunum er so vánalig, sum hon er. Ein kreativur viðmerkjari á Facebook rakti seymin á høvdið, tá ið hann segði: *Eg ivist í, hvussu vit kunnu fáa løgtingslimir at ganga saman í blokk, tá teir ikki duga at ganga saman í flokk.*

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Martin Joensen / Jens Kristian Vang